# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 28. januar 2026, kl. 17.00

**Møtt á fundi:** **Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Jákup S. Jóanesarson, Karl A. Olsen, Janus Jensen, Pauli Magnussen og Anja Haldansen**

**Skrivari:** **Sólvit Nolsø**

---

Magnus Müller og Jákup Durhuus luttók eisini á fundinum.

**Viðgjørt á almennum fundi:**

**Mál 85: Broyta heiti á játtan á FÆ26**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt eitt tilmæli frá umsitingini um at broyta heitið á eini játtan á FÆ26. Umsitingin mælir til at broyta játtanina, sum eitur "Niðara Vegi, Gerðisvegi og Bakkavegi" til "Niðara Vegi, Gerðisvegi og Leitisveg". Grundgevingin fyri at broyta heitið er, at vegurin inni á Leiti er í so ringum standi, at tær 200tkr, sum eru settar av til asfaltering, eru burturspiltar um uppbygnaðurin av vegnum ikki er rættur. Standurin er so mikið ringur, at streymveitingin til lyktapelarnar og rør hjá SEV eru við at koma undan. Tilmælið er at broyta játtanina soleiðis, at Leitisvegur kemur á ístaðin fyri Bakkaveg. Vavi av verkætlanini á Bakkavegi er ókend og endalig avgerð er heldur ikki tikin um, hvat skal gerast. Strekki er góðar 90 metrar.

Bæði tekniska nevnd og fíggjarnevndin mæla bygdarráðnum til at ganga tilmælinum á møti.

**Viðv. 85**
Magnus Müller, tekniskur leiðari, greiddi frá orsøkini hví umsitingin mælir til at broyta heitið á FÆ26.
Málið var einmælt samtykt. Tekniska nevnd fer at gera eina ætlan fyri, hvussu arbeiðið skal gerast.

Fundur lokin kl. 18:07

Vestmanna 28.01.2026

| | | |
|---|---|---|
| Sára Jógvandóttir | Símun Jákup Højsted | Jákup S. Jóanesarson |
| Karl A. Olsen | Janus Jensen | Pauli Magnussen |
| | Anja Haldansen | |